# Umsókn um læruplássgóðkenning

| | |
|---|---|
| **Yrki og sergrein** | **Elektrikari** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn á fyritøku | | | |
| Bústaður | | Telefon | |
| V-tal | | T-postur | |

| | |
|---|---|
| Umsóknin fevnir um deild | |
| Dagligur leiðari | |
| Ábyrgdari av verkligu læruni hjá lærlingum | |
| Hevur virkið fleiri arbeiðsstaðir? | |

| | |
|---|---|
| Tal av starvsfólkum | |
| Yrkislærd í føstum fulltíðarstarvi sum elektrikari | |
| Útlærdir elektrikarar við meiri enn 3 ára starvsroyndum | |
| Hevur fyritøkan áður havt læruplássgóðkenning | |
| Løggildingarnummar: | |

***Gev gætur:***

*1. Skrásetingarprógv fyri skráseting í vinnuskránni skal leggjast við*

*2. Læru- ella sveinabræv hjá ábyrgdara av verkligu læruni hjá lærlingum skal leggjast við. Er eingin í føstum fulltíðarstarvi við hesi útbúgvingini, skal virkið gera viðmerking um hetta niðanfyri.*

| |
|---|
| Stutt lýsing av virkseminum hjá fyritøkuni, og tær vørur og tænastur sum fyritøkan veitir. Umframt hetta, møguligar aðrar viðkomandi upplýsingar í samband við umsókn um læruplássgóðkenning. |
| |

**Uppgávur, lærlingurin kemur at takast við**

Fyri at fyritøkan kann góðkennast sum læerupláss, er neyðugt, at lærlingar læra niðanfyristandandi arbeiði. Tilskila tí hvørjar arbeiðsuppgávur lærlingurin kemur arbeiða við.

- Hugtakið "Javnan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum eru rutina hjá virkinum
- Hugtakið "Sjáldan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum verða gjørdar av virkinum, men sum ikki eru rutinuuppgávur
- Hugtakið "Ongantíð" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum als ikki verða gjørdar av virkinum

| Virksemi | Javnan | Sjáldan | Ongantíð |
|---|---|---|---|
| Nýbygging | | | |
| Stikk-, bólka og høvuðsleiðingar | | | |
| Innlegging av ljósi | | | |
| Innlegging av ljósútbúnaði | | | |
| Innlegging av antennuútbúnaði | | | |
| Innlegging av motorum | | | |
| Innlegging á maskinum | | | |
| IBI-innleggingar, miðstøða t.d. (IHC, Comlux, SmartHouse) | | | |
| Stýringar við relæum og forritaðum eindum | | | |
| Innlegging og forritan av PLC | | | |
| Dátuuppsamling og viðgerð t.d. (SCADA og visualisering) | | | |
| Tele innleggingar | | | |
| Dátu innleggingar | | | |
| Samanseting av teleútbúnaði | | | |
| Samanseting av dátuútbúnaði | | | |
| Uppsetan og samanseting av kervisteknikki (netverksteknikki) | | | |
| Hita- og ventilatiónsinnleggingar | | | |
| Styring og regulering av ventilatión/hita/køling | | | |
| IBI-innleggingar "decentrale" t.d. (EIB, LON) | | | |
| Innlegging av tryggingarútbúnaði t.d. (AIA-, ADK-, ABA-útbúnaði) | | | |
| Programering av CTS-útbúnaði | | | |

**Aðrar uppgávur**

| Upplýs møguligar aðrar uppgávur, ið lærlingur fær upplæring í | Javnan | Sjáldan | Ongantíð |
|---|---|---|---|
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |

Góðkenning av virki sum læripláss verður latin fyri 5 ár í senn.

Viðgerðin av umsóknini um læruplássgóðkenning tekur støði í reglugerð um góðkenning av læruplássum, sum Yrkisnevndin samtykti 4. mai 2006. Partur av viðgerðini kann eisini vera ein sýnsmeting. Lógargrundarlag: Løgtingslóg nr 94 um yrkisútbúgvingar frá 1998

Umsóknin verður løgd fyri Yrkisnevndina at taka støðu til.
Í sínum metingum um virkið kann fáa lærugóðkenning leggur Yrkisnevndin dent á:

1. at yrkislærd fólk er á staðnum, við samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndum, kann standa fyri upplæringini
2. at virkið javnan fremur allar tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar, sum hoyra til viðkomandi yrkisgrein
3. at virkið hevur ta útgerð, sum eru neyðug fyri at kunna útinna arbeiðsuppgávurnar smb. pkt. 2.
4. at virkið lýkur treytirnar um arbeiðsumhvørvi, sum eru ásettar í lógum og reglum um gott og trygt arbeiðs - umhvørvi.

Fyritøkan váttar, at givnu upplýsingarnar eru rættar og í samsvari við galdandi ásetingar á yrkisútbúgvingarøkinum og við innihaldið í viðkomandi útbúgvingarkunngerð
Fyritøkan váttar samstundis, at hon er kunnað við galdandi lóggávu á økinum og við innihaldið í reglugerðina um góðkennig av læruplássum, og er før fyri at nøkta ásettu krøvini við atliti til upplæringina innan viðkomandi yrkisgrein.

__________________________ ___________________________________

*Dagfesting* *Undirskrift virkisleiðarans*

Umsóknin skal sendast til **yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo**

**Útbúgvingarkunngerðin, vísur á førleikamálini í kapittul 3:**

**Førleikamál við útbúgvingarlok**
**§ 9.** Førleikarnir, ið lærlingurin skal hava ognað sær við útbúgvingarlok, eru, at hann dugir:
1) At greiða úr hondum arbeiði við støði í galdandi reglum um trygd og arbeiðsumhvørvi,
2) at greiða úr hondum arbeiði á ella nær við spenningsleysa og spenningsleiðandi innlegging, talvuútbúnað og kaðalskáp,
3) at menna arbeiðsgongdir og innleggingarloysnir innan yrkið,
4) at greiða úr hondum innleggingar, sjálvvirkandi útbúnað og byggja upp smærri bólka- og stýritalvur innan bústaðir og vinnu og harafturat seta til brúkslutir sambært galdandi reglum og tryggja, at meginreglurnar fyri innlegging verða fylgdar,
5) at góðskutryggja, undir hesum fremja viðkomandi mátingar og brúka útgerð á rættan hátt í sambandi við roynd og eftirskoðan av innlegginum, og harafturat evna til og umsita skjalfestingar, brúkaraleiðbeiningar og røktarætlanir,
6) at greiða úr hondum jørð- og afturjavningarsamband,
7) at greiða úr hondum viðlíkahald og skipaða leiting eftir breki, fyri síðani at betra um innleggingar og brúkslutir,
8) at leggja káplar til dátunet og harafturat leggja inn tráðleyst net sambært galdandi reglum,
9) at dimensionera stikk-, høvuðs- og bólkaleidningar, bólkatalvur, ljós- og kraftinnleggingar og harafturat maskininnleggingar,
10) at brúka kunningartøkni til viðkomandi arbeiðsuppgávur,
11) at ráðgeva og vegleiða brúkaran um, hvussu útbúnaður og innleggingar virka,
12) at samskifta um arbeiðsstøðuna,
13) at greiða úr hondum smærri sjálvvirkandi útbúnað, har ímillum at seta til 1- og 3-fasu brúkslutir, motorar við ymiskum stýringum og koplingum við støði í vitanini um teir vanligastu følararnar og rele-ini,
14) at leggja inn, stýra, regulera og finna brek og veita tænastu og viðlíkahald á ljósbúnað innan bústaðir og vinnu,
15) at greiða úr hondum íbindingar á veitingarkervi,
16) at ráðgeva um og fremja orkumenning sambært galdandi krøvum,
17) at leggja inn, forrita, viðlíkahalda og finna brek á sjálvvirkandi útbúnaði, undir hesum greiða úr hondum maskininnleggingar,
18) at tilevna og rokna út ljósinnleggingar við atliti at hentleika, umhvørvi og orku,
19) at leggja inn, forrita, viðlíkahalda og finna brek á sjálvvirkandi útbúnað innan bústaðir og vinnu, og
20) at seta upp net til telefon, dátu og út- og sjónvarp innan bústaðir.

Les meira í kunngerðini her